| Verður sent kommunu/presti/sýslumanni, har annar av pørtunum býr | Verður fylt út av kommunu/presti/sýslumanni | |
|---|---|---|
| | Móttikið dagfesting | Journalnummar |

# Hjúnalagsfráboðan

## Leiðbeining

Prestur, sýslumaður ella býráðsformaður eru eftirkanningarmyndugleikar í Føroyum, og skulu kanna eftir, um partarnir lúka treytirnar fyri giftu.

**At fylla út og lata inn fráboðanina**
Allir spurningar í oyðublaðnum skulu svarast.

Útfylta fráboðanin skal, saman við neyðugum skjølum og váttanum (sí síðu 4), latast einum av eftirkanningarmyndugleikunum, har annar av pørtunum býr. Hevur hvørgin parturin bústað í Føroyum, fer eftirkanningin fram, har annar av pørtunum heldur til.

**Eftirkanningarváttan**
Skal vígslan fara fram hjá øðrum myndugleika enn honum, ið gjørt hevur eftirkanningina, letur eftirkanningarmyndugleikin pørtunum eina váttan um, at treytirnar fyri hjúnalagi eru loknar. Partarnir skulu í sambandi við vígsluna lata vígslumyndugleikanum hesa váttan. Váttanin má ikki vera meira enn 4 mánaðir gomul vígsludagin.

**Millum- og eftirnavn eftir vígslu**
Sambært § 13, stk. 1 og 2 í løgtingslóg um fólkanøvn* kann annar hjúnafelagin, við samtykki frá hinum, boða frá, at hann tekur millum- og/ella eftirnavnið hjá hinum hjúnafelaganum. Tað er ikki gjørligt at taka millum- og/ella eftirnavn, sum hin hjúnafelagin hevur fingið í einum hjúnalagi.

Egið millum-/eftirnavn er tað millum-/eftirnavn, ið ein hevur fingið við føðing ella seinni hevur fingið á annan hátt enn við giftu.

**Meira vegleiðing**
Hevur tú spurningar ella tørv á meira vegleiðing, kanst tú seta teg í samband við eftirkanningarmyndugleikan.

Reglurnar um giftu standa í fyriskipan um gildiskomu fyri Føroyar av lóg um hjúnaband og hjúnaskilnað og í kunngerð og rundskrivi fyri Føroyar um giftu.**

* Løgtingslóg nr. 41 frá 26. mars 2002 um fólkanøvn, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 26. mars 2021

** Anordning nr. 37 af 22. januar 2002 om ikrafttræden for Færøerne af lov om ægteskabs indgåelse og opløsning, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 78 frá 29. mai 2017

Bekendtgørelse nr. 68 af 7. februar 2002 for Færøerne om ægteskabs indgåelse, sum seinast broytt við kunngerð nr. 110 frá 23. juli 2018

Cirkulære nr. 9 af 7. februar 2002 for Færøerne om ægteskabs indgåelse, sum broytt við kunngerð nr. 116 frá 23. juli 2018

## Upplýsing om vígslustað

| Navn – kirkja, sýsla, annað vígslustað | Vígsludagur og -ár |
|---|---|
| | |

Góðkent av Almannamálaráðnum 2022

**Upplýsingar frá kvinnuni**

| | | |
|---|---|---|
| Núverandi eftirnavn | Egið millumnavn* | Egið eftirnavn* |

| | |
|---|---|
| Fornøvn | Millumnavn |
| Skrásetingarstaður fyri føðing (sókn og kommuna) | Føðingardagur og -ár |

| | | |
|---|---|---|
| Bústaður | Postnr. | Bygd/býur |

| |
|---|
| Bústaðarkommuna |

| | |
|---|---|
| Teldupostur | Telefonnummar |
| Ert tú danskur ríkisborgari<br>☐ Ja ☐ Nei | Um ikki, ríkisborgarastøða |

## Hevur tú áður verið gift?

| | |
|---|---|
| Hevur tú áður verið gift<br>☐ Nei ☐ Ja | Um so er, hvussu varð seinasta giftan upployst?<br>☐ Hjúnaskilnaður ☐ Andlát ☐ Ógilding |
| Fult navn á seinasta hjúnafelaga | |

## Børn

| |
|---|
| Hevur tú børn við øðrum enn tí, tú vilt giftast við (fevnir eisini um myndig børn og ættleidd børn)?<br>☐ Nei ☐ Ja |
| Væntar tú barn við øðrum enn tí, tú skalt giftast við?<br>☐ Nei ☐ Ja |

## Onnur persónlig viðurskifti

| |
|---|
| Sambært § 3 i hjúnabandslógini skulu persónar undir verjumáli prógva, at verjin gevur samtykki til hjúnalagið |
| Ert tú undir verjumáli ella frátikin løgræði?<br>☐ Nei ☐ Ja |
| Sambært § 5 í hjúnabandslógini kann gifta ikki fara fram millum persónar, ið beinleiðis eru í ætt hvørt við annað (t.d. millum foreldur og børn) ella millum systkin |
| Ert tú so nær, sum omanfyri nevnt, í ætt við tann, tú vilt giftast við?<br>☐ Nei ☐ Ja |
| Sambært § 6 í hjúnabandslógini kunnu persónar, har annar av pørtunum hevur verið giftur við einum, ið beinleiðis eru í ætt við hin (t.d. millum verforeldur og -børn), ikki ganga í hjúnalag uttan loyvi frá Familjufyrisitingini |
| Ert tú so nær, sum omanfyri nevnt, svágd við tann, tú vilt giftast við?<br>☐ Nei ☐ Ja |
| Sambært § 7 í hjúnabandslógini mugu ættleiðari og ættleitt barn ikki ganga í hjúnalag við hvørjum øðrum, so leingi ættleiðingin stendur við |
| Eru ættleiðingarviðurskiftini millum teg og tann, tú vilt giftast við, sum omanfyri nevnt?<br>☐ Nei ☐ Ja |

## Millum- og eftirnavn eftir vígslu

Vilt tú í sambandi við vígsluna

- ☐ varðveita verandi eftirnavn
- ☐ varðveita verandi millumnavn
- ☐ taka aftur egið eftirnavn*
- ☐ taka aftur egið millumnavn*
- ☐ taka eftirnavnið hjá hinum partinum sum eftirnavn (um ikki hin parturin hevur fingið navnið við giftu), soleiðis at báðir partar eftir vígslu hava sama eftirnavn.
- ☐ taka millumnavnið hjá hinum partinum sum millumnavn (um ikki hin parturin hevur fingið navnið við giftu), soleiðis at báðir partar eftir vígslu hava sama millumnavn.
- ☐ bera egið eftirnavn sum millumnavn framman fyri hjúnanavninum

Fult navn eftir vígslu ____________________________________________

* Egið millum-/eftirnavn er tað millum-/eftirnavn, ið ein hevur fingið við føðing ella seinni hevur fingið á annan hátt enn við giftu.

Minnist til at undirskriva á síðu 3

Góðkent av Almannamálaráðnum 2022

F-VI 1A-3

## Upplýsingar frá kvinnuni

| Núverandi eftirnavn | Egið millumnavn* | Egið eftirnavn* |
|---|---|---|

| Fornøvn | Millumnavn |
|---|---|

| Skrásetingarstaður fyri føðing (sókn og kommuna) | Føðingardagur og -ár |
|---|---|

| Bústaður | Postnr. | Bygd/býur |
|---|---|---|

| Bústaðarkommuna |
|---|

| Teldupostur | Telefonnummar |
|---|---|

| Ert tú danskur ríkisborgari<br>☐ Ja ☐ Nei | Um ikki, ríkisborgarastøða |
|---|---|

## Hevur tú áður verið gift?

| Hevur tú áður verið gift<br>☐ Nei ☐ Ja | Um so er, hvussu varð seinasta giftan uppleyst?<br>☐ Hjúnaskilnaður ☐ Andlát ☐ Ógilding |
|---|---|
| Fult navn á seinasta hjúnafelaga | |

## Børn

Hevur tú børn við øðrum enn tí, tú vilt giftast við (fevnir eisini um myndig børn og ættleidd børn)?
☐ Nei ☐ Ja

Væntar tú barn við øðrum enn tí, tú skalt giftast við?
☐ Nei ☐ Ja

## Onnur persónlig viðurskifti

Sambært § 3 i hjúnabandslógini skulu persónar undir verjumáli prógva, at verjin gevur samtykki til hjúnalagið

Ert tú undir verjumáli ella frátikin løgræði?
☐ Nei ☐ Ja

Sambært § 5 í hjúnabandslógini kann gifta ikki fara fram millum persónar, ið beinleiðis eru í ætt hvørt við annað (t.d. millum foreldur og børn) ella millum systkin

Ert tú so nær, sum omanfyri nevnt, í ætt við tann, tú vilt giftast við?
☐ Nei ☐ Ja

Sambært § 6 í hjúnabandslógini kunnu persónar, har annar av pørtunum hevur verið giftur við einum, ið beinleiðis eru í ætt við hin (t.d. millum verforeldur og -børn), ikki ganga í hjúnalag uttan loyvi frá Familjufyrisitingini

Ert tú so nær, sum omanfyri nevnt, svágd við tann, tú vilt giftast við?
☐ Nei ☐ Ja

Sambært § 7 í hjúnabandslógini mugu ættleiðari og ættleitt barn ikki ganga í hjúnalag við hvørjum øðrum, so leingi ættleiðingin stendur við

Eru ættleiðingarviðurskiftini millum teg og tann, tú vilt giftast við, sum omanfyri nevnt?
☐ Nei ☐ Ja

## Millum- og eftirnavn eftir vígslu

Vilt tú í sambandi við vígsluna

☐ varðveita verandi eftirnavn

☐ varðveita verandi millumnavn

☐ taka aftur egið eftirnavn*

☐ taka aftur egið millumnavn*

☐ taka eftirnavnið hjá hinum partinum sum eftirnavn (um ikki hin parturin hevur fingið navnið við giftu), soleiðis at báðir partar eftir vígslu hava sama eftirnavn.

☐ taka millumnavnið hjá hinum partinum sum millumnavn (um ikki hin parturin hevur fingið navnið við giftu), soleiðis at báðir partar eftir vígslu hava sama millumnavn.

☐ bera egið eftirnavn sum millumnavn framman fyri hjúnanavninum

Fult navn eftir vígslu ____________________________________________________

* Egið millum-/eftirnavn er tað millum-/eftirnavn, ið ein hevur fingið við føðing ella seinni hevur fingið á annan hátt enn við giftu.

## Dagfesting og undirskrift

Fráboðanin skal latast og undirskrivast persónliga av pørtunum, áðrenn vígslan kann fara fram. Annar parturin kann ikki undirskriva fyri hin partin sambært fulltrú. **Um so er, at tú í fráboðanini hevur givið skeivar upplýsingar, kanst tú revsast sambært § 163 í revsilógini.** Við undirskrift tíni váttar tú samstundis, at tú ert vitandi um at tær upplýsingar, hin parturin hevur givið um møgulig børn, **og at tað samsvarar við tína vitan**. Um hin parturin tekur títt millum- og/ella eftirnavn, er tín undirskrift samstundis títt samtykki til tess. Váttanir, eldri enn 4 vikur, verða ikki góðkendar.

| Dagfesting og undirskrift | Dagfesting og undirskrift |
|---|---|

# Skjøl, ið skulu latast saman við fráboðanini

**Skjalprógv fyri navni og føðingardegi**
Føði-, dóps- ella navnabræv og møguligt navnaprógv skal latast saman við fráboðanini. Nøvn, ið víkja frá ella ikki eru á hesum váttanum, skulu skjalprógvast á annan hátt.

Útlendingar, ið ikki eru ríkisborgarar í einum av Norðurlondunum, skulu prógva, at teir lógliga eru í Føroyum. Leiðbeining um hetta fæst við at venda sær til eftirkanningarmyndugleikan. Um so er, at útlendingur ikki kann prógva føðingardag sín ella rættan stavingarhátt á navni sínum við føði-, dóps- ella navnabræv, skal annað skjalprógv fyri hesum vísast fram, sum t.d. pass ella koyrikort.

**Giftir persónar, ið eru skildir í Føroyum ella í Danmark**
Hjúnaskilnaðarloyvi ella útskrift úr dómi um hjúnaskilnað skal vísast fram.

Við útskriftini av hjúnarskilnaðardómi skal fylgja ein váttan frá viðkomandi býarrætti um, at kærustevning ikki er latin, áðrenn kærufreistin var úti, ella váttan um, at kærufreistin er úti, og at kæran bara snýr seg um hjúnaskilnaðartreytirnar. Við útskriftunum av landsrættardómum skal fylgja ein váttan av sama slag frá Højesterets Justitskontor. Í staðin fyri váttan frá býarrætti ella Hægstarætti kann verða víst fram prógv fyri, at fyrrverandi hjúnafelagin hevur havnað møguleikanum at kæra, ella at kæran bert fer at snúgva seg um hjúnaskilnaðartreytirnar. Hetta er tó ikki neyðugt, um tað av dóminum sæst, at fyrrverandi hjúnafelagin hevur sagt seg taka undir við, at hjúnalagið verður upployst við hjúnaskilnaði, eisini hóast hjúnafelagin ikki var samdur í hjúnaskilnaðartreytunum.

Dómar, ið sagdir eru undan 1. januar 1983, skulu hava átekning frá yvirrættinum um, hvørt dómurin er skotin inn fyri hægri rætt, ella skulu prógv fylgja við, sum vísa, at mótparturin hevur havnað møguleikanum at kæra ella hevur avmarkað kæruna til hjúnaskilnaðartreytirnar.

Tað skal skjalprógvast, at tað ikki var felagsogn í fyrra hjúnalagnum, ella at ein møgulig felagsogn ikki forðar nýggjum hjúnalagi. Hetta kann verða gjørt við at vísa fram eitt ella fleiri av hesum skjølum:

1) Váttan frá skiftirættinum um, at felagsbúgvið er ella hevur verið til alment skifti.
2) Sáttmáli um búskifti, harav tað sæst, at privat skifti er lokið.
3) Váttan frá fyrrverandi hjúnafelagnum um, at viðkomandi einki krav hevur um búskifti.
4) Dómur um hjúnaskilnað, um sundurlesing ella um ógildan ella loyvi til hjúnaskilnað ella sundurlesing, harav sæst, at felagsbúgvið er býtt, ella at allar ognir í hjúnalagnum vóru serogn.
5) Tinglýstan hjúnasáttmála, sambært hvørjum allar ognir í hjúnalagnum vóru serogn.
6) Prógv fyri, at fyrrverandi hjúnafelagin er giftur uppaftur her í ríkinum.
7) Samtykki at giftast frá fyrrverandi hjúnafelaga, hóast felagsbúgvið ikki er skift.
8) Loyvi frá Familjufyrisitingini at sleppa undan skifti.

**Persónar, ið hava verið giftir, men hvørs hjúnafelagi er deyður**
Tað skal skjalprógvast, at eingin felagsogn var í fyrra hjúnalagi, ella at ein møgulig felagsogn ikki forðar nýggjum hjúnalagi. Hetta kann verða gjørt við at vísa fram eitt ella fleiri av niðanfyrinevndu skjølum:

1) Váttan frá skiftirættinum um, at felagsbúgvið er ella hevur verið til alment skifti.
2) Váttan frá skiftirættinum um, at felagsbúgvið er latið til privat skifti, og váttanir frá øllum arvingum hansara /hennara, ið deyð/ur er, at skiftið er lokið.
3) Váttan frá skiftirættinum um, at hin deyði einki læt eftir seg, at búgvið er tikið til at gjalda jarðarferðarútreiðslurnar við, ella at búgvið er latið sambært § 10, stk. 2 í skiftislógini.
4) Váttan frá skiftirættinum um, at felagsbúgvið er latið eftirsitandi hjúnafelaga sambært § 62 b, stk. 2 í skiftislógini.
5) Skjalprógv frá skiftirættinum um, hvørjir arvingarnir hjá tí deyða eru, og váttanir frá øllum arvingum, at teir antin frásiga sær skiftið ella geva játtilsi til giftu, hóast búgvið ikki enn er skift.
6) Váttan frá skiftirættinum ella tinglýstan hjúnasáttmála, sambært hvørjum allar ognir í hjúnalagnum vóru serogn.
7) Skjalprógv um sundurlesing, eitt nú um býti av búnum, um serogn ella at krav um býti av búnum er slept, um hjúnafelagarnir vóru sundurlisnir, tá hjúnafelagin doyði, og eftirsitandi hjúnafelagin váttar, at samlívið ikki hevur verið tikið uppaftur.
8) Loyvi frá Familjufyrisitingini at sleppa undan skifti.

**Persónar undir 18 ár**
Tey, ið ikki hava fylt 18 ár, kunnu ikki giftast uttan loyvi frá Familjufyrisitingini og skrivligt samtykki frá foreldrunum, uttan so at tey hava verið gift áður.

**Útlendskir hjúnaskilnaðir og deyðsváttanir**
Skjalprógv um hjúnaskilnað í øðrum enn Norðurlondum, skal leggjast fyri Familjufyrisitingini.

Vegleiðing um treytir fyri at leggja mál um útlendskar hjúnaskilnaðir fyri Familjufyrisitingina og um deyðsváttanir fæst hjá kommununi. Bið kommununa um vegleiðing í góðari tíð.

**Fleiri upplýsingar**
Fleiri upplýsingar fáast hjá eftirkanningarmyndugleikanum ella Familjufyrisitingini.


estra 478500